## Kalifornia bannar samkynt giftamál

Í Kalifornia skuldu veljararnir taka støðu til fleiri ymisk mál samstundis, sum tey skuldu velja forseta. Mesta umrøðu – burtursæð frá sjálvum forsetavalinum, sjálvandi – fekk »proposal 8«, ið var eitt uppskot um at banna samkyntum giftamálum. Og tey verða bannað, tí tá 89% av valstøðunum vóru tald upp, vóru 51,7% fyri at banna samkyntum giftamálum og 48,3% ímóti. Kalifornia er annars ein ógvuliga frísinnaður statur í so máta, og San Francisco er heimshøvuðsstaður fyri samkynt. Sama lógaruppskot var eisini til atkvøðu í tveimum øðrum statum, Florida og Oregon, og eisini í teimum báðum statunum varð samkynt giftamál bannað.



# Neyðugt at umskipa fiskiflotan



*Meinhard Jacobsen, stjóri í Faroe Seafood*

**Eftir nøkrum árum við høgum oljuprísi og manguli upp á arbeiðskraft siglir føroyska fiskivinnan í tungum sjógvi í løtuni. Men lógin um vinnuligan fiskiskap forðar fyri, at vit kunnu koma víðari. – Vit vóna og vænta, at politiski myndugleikin setir tiltøk í verk, so tað verður lættari at umskipa flotan, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Faroe Seafood**

FISKIVINNA
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

– Stóri samfelagsligi trupulleikin hjá okkum í dag er, at tað kemur alt ov lítið av fiski upp á land. Men hóast hetta er ein grundleggjandi spurningur, er hetta ikki ein spurningur sum hevur serliga stóran politiskan áhuga.

Tað er greiða útmeldingin frá stjóranum á Føroya størsta fiskavirki, Faroe Seafood, Meinhard Jacobsen, fáar dagar eftir nógvu umtaluna av fiskavirkinum í Vági, har einki arbeiði hevur verið í fleiri vikur.

– Tað eru ov fáir bátar sum royna í løtuni, fleiri partrolarar liggja inni, og tað sama gera fleiri av djúpvatnstrolarunum. Tí kemur alt ov lítil fiskur upp á land til virkini at arbeiða, sigur Meinhard Jacobsen.

Til fyri nøkrum mánaðum síðani vóru aðrir trupulleikar hjá fiskivinnuni at dragast við. Tá vóru tað høgir oljuprísir og mangul upp á arbeiðskraft. Høgu oljuprísirnar var tað eingin, sum kundi gera nakað við, men trupulleikin við manguli upp á arbeiðskraft kundi verið loystur, um politiski myndugleikin hevði handlað í tøkum tíma. Men tað dró út, og tá so ein lógarbroyting endiliga kom, so var hetta ikki so viðkomandi longur.

### Tíðirnar broytast

Í dag eru aðrir trupulleikar í fiskivinnuni, sum krevja politiska handling, áðrenn ov seint er. Meinhard Jacobsen vísir á, at tað sum hevur útloyst stóru trupulleikarnar, sum eru í dag, er høgi oljuprísurin og hartil vánaligur fiskiskapur. Og hiðani stavar tørvurin á at gera tillagingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

– Vit hava í løtuni eina lóg, sum forðar fyri stórum eindum í fiskivinnuni. Tí ber ikki til at umskipa flotan, so at rakstur kann fáast í hann. Stórur partur av flotanum liggur stillur, og hóast stórir aktørar eru sinnaðir at gera nakað, so sleppa teir ikki, og teir smáu aktørarnir hava kanska ikki orku til at fremja neyðug átøk, greiðir Meinhard Jacobsen frá.

Men stjórin í Faroe Seafood er tó ikki fortalari fyri, at vit bert skulu hava stórar eindir í føroysku fiskivinnuni, hann mælir til at finna ein gyltan millumveg. Hann viðgongur, at tað ikki er so einfalt, at um vit bert fáa stórar eindir, so eru allir trupulleikar loystir. Men tað burdi verið møguleiki fyri at havt bæði stórar aktørar og smáar aktørar.

- Skalt tú menna nakað í Føroyum, so mugu størri eindir til. Sum skipanin er nú, so kann ein eind í mesta lagi hava 20 prosent av fiskidøgunum innan ávísan fiskibólk. Hesin felagsnevnarin kann vera óheppin og forðandi, vísir Meinhard Jacobsen á.

- Hjá fiskivinnuni gongur upp og niður, og fyri at kunna taka niðurtúrarnar, so er neyðugt, at rætt verður borið at, meðan tíðirnar eru góðar, heldur hann.

### Tørvur á grundleggjandi kjaki

Stjórin í Faroe Seafood heldur, at vit ikki kunnu síggja burtur frá, at fiskivinnan er, og helst kemur at vera mest týðandi vinna í Føroyum. Tí er neyðugt at taka trupulleikarnar hjá fiskivinnuni í álvara, og ikki minst at handla, meðan tíðin er inni.

– Tað er neyðugt at fáa eina grundleggjandi viðgerð av spurninginum um, hvussu bygnaðurin í fiskivinnuni kann broytast. Men vit hava í dag nakrar lógir, sum eru sera avmarkandi, sigur Meinhard Jacobsen og sipar millum annað til sokallaðu »anti-trust« lógina, sum forðar fyri at størri eindir kunnu virka í vinnuni.

– Hetta er ein lóg, sum forðar fyri, at fiskiflotin verður umskipaður og tillagaður nýggjar tíðir, sigur hann.

Men um ótti er fyri monopolarisering av fiskiflotanum, um antitrust-lógin varð avtikin, so kundi loysn verið funnin á tí, metir hann:

– Tað hevði borið til at havt stórar eigaraskarar til færri og størri skip, heldur enn smáar eigaraskarar til fleiri og minni skip.

Í stuttum kann sigast, at stórin í Føroya størsta fiskavirki eftirlýsir eina meiri smidliga lóg um vinnuligan fiskiskap, sum ger tað lættari og skjótari at fremja broytingar, so hvørt sum tíðirnar broytast.



*Fleiri partrolarar liggja inni, og tað sama gera fleiri av djúpvatnstrolarunum. Tí kemur alt ov lítil fiskur upp á land til virkini at arbeiða, sigur Meinhard Jacobsen*